# Kristian Rókstein
## er farin foldum frá

Ein av okkara trúgvastu tilflytarum her í Fuglafirði var sum vit søgdu við navnið - Hellu Kristian.

Kristian var sum so mangur annar føroyingur sjómaður sum flutti til Fuglafirðar saman við konu síni Talu. Har var arbeiði fyri allar hendur á landi, og tað var hansara stavnhald at koma á land at arbeiða. Kristian var ein trúgvur raskur pálítiligur arbeiðsmaður. Hann bygdi sær hús her - um Heygar - og til teirra vóru øll vælkomin.

Ja, nú situr Tala einsamøll framman fyri køksvindeyganum og stærur niðan í kirkjugarðin - tankarnir sveima út í rúmið og síðan aftur til tað farnu tíð, tá tit vóru mong í húsi har yviri á Hellunum.

Sagt verður at »tíðin lekir øll sár«.

Kristian Rókstein gav øllum frið, nú hevur Kristian fingið frið.

Vit goyma góð minni eftir Kristian Rókstein.

**Albert**

# Dávur Jacobsen í Søldarfirði 80 ár



Leygardagin 9. september fylti Dávur Jacobsen í Søldarfirði 80 ár.

Dávur er sonur Per í Niðara Gerði og Gustu, fødd Olsen av Heimbø. Sagt er um hann, at hann var vesælur og neyðarsligur smádrongur, hvørs fyrstu minni eru av sjúkrahúsinum. Kortini skuldi hann gerast Føroya yngsti forsyrgjari, tá pápin fórst við Emmanuel, tá Dávur bert var 5 ára gamal og elstur av brøðrunum.

Dávur var ein av teimum hepnu, sum fekk útbúgving á universitetinum hjá Frú Bjarnadal longu frá at hann var 6 ára gamal. Tá mundi botnurin verða lagdur til ein seinni vælvirkandi knokk. Tað var ein fátøk tíð í tríatiárúnum, men Dávur minnist ikki at vera farin svangur til songar.

Hann plagar at taka til, at tey vóru so fátøk, at tey ikki høvdu ráð at eta margarin, so tey ótu bara smør. Tað kundu tey vituliga kyrna sjálvi, tí kúgv var í kjallaranum.

Hvat ávirkaði hansara seinni lívsleið er kanska ivasamt, men hansara fyrsta arbeiði var vegarbeiði, at hampa um koyrivegin í bygdini fyri kommunu og løgting, og seinni at gera bakkavegin inn á Grønuskrið. So kom kríggið og so smíðaði hann barakkir og oljutangar og tá kríggið var av fór hann til Íslands at arbeiða á einum bóndagarði. Hann droymdi um at gerast skipari, men ferðirnar aftur og fram úr Íslandi og onkur sildartúrur við íslendingum munnu hava kureráð hann, tí stutt eftir fór hann í læru sum húsasmiður í Íslandi og er harvið ein av helst sera fáum føroyingum við íslendskum sveinabrævi.

Í 1949 var Dávur heima í Føroyum og vendi og bleiv tá giftur við Inger hjá Per Uppi í Toft bónda í Søldarfirði. Inger hevði eisini verið í Íslandi og tey fluttu aftur til Íslands eftir brúdleypið. Í 1950 verður Bára fødd og árið eftir flyta tey aftur til Føroya. Tá vóru ringar tíðir í Føroyum, men kortini var Dávur so heppin at hitta Niels Paula á Glyvrum, sum útvegaði honum arbeiði at gera bolverk á keiini í Runavík.

Næsta arbeiði var at gera lærarahús í Lamba. Í 1952 gjørdi hann keivegin í Søldarfirði og so fór hann til SEV í Vestmanna. So varð Petur føddur. Og frá 1953 og eftir Sjóvinnubankakrakkið var at kalla alt svartasta armóð í Føroyum.

Dávur fór til Grønlands at arbeiða hjá Lamhauge & Waagstein.

Heimafturkomin fekk Petur í Gong í Havn fatur á honum og Dávur fór at byggja Kommunuskúlan í Havn og seinni eisini Sjómansskúlan. Síðan var hann í Miðvági. Hann var hjá Landsbyggifelagnum. Á Eiði og norðuri í Vík, gjørdi keiir, vegir og hús. Og tað var eisini Petur í Gong, sum lokkaði hann til Klaksvíkar at byggja sjúkrahúsið í 59/60 - tá flutti

Inger norður við báðum børnunum at búgva fyribils. Hetta „fyribils“ vardi í 24 ár og „runu-Dávur“ gjørdist ein ímynd í Klaksvík. Hann gjørdi keiarbeiði, hann gjørdi bátabrúgvarnar á Stongunum, vegin millum Hvannasund og Viðareiði og mangt mangt annað.

Í 1967 arbeiddi Dávur saman við Jógvan Gerðalíð við útstykkingum í Klaksvík. Teir gjørdust tað mann kann kalla „partnarar“. Dávur teknaði og roknaði Jógvan tók sær av maskinunum. Bergmál, kallaðist felagið, sum kom at gera nógv arbeiði sum fráleið. Dávur gjørdi nógv onnur stórarbeiði, stórt keiarbeiði á Skála, í Norðdepli, hann gjørdi brúnna um Gøtugjógv og havnaarbeiði í Fuglafirði. Saman við svogrinum Rasmusi í Toft gjørdu teir stór havnaarbeiði í Skopun, trolhylin hjá Vónini og t.d. FK-bygningin í Fuglafirði - og ítróttarvøllin hjá ÍF! Fleiri lendingar gjørdu teir, og mong slík arbeiði komu aftrat, tá felagið fekk navnið Dekkon og fleiri komu við.

Arbeiðssøgan hjá Dáva er long og fyllir heilt bókaverk.

Dávur misti konuna Inger í 1986 av herviligari sjúku. Seinni rann saman millum hann og Mariu, einkjuna eftir Leif Berg, systkinabarn Dáva, ið var deyður stutt frammanundan. Tey giftust og hava nú Dávur fyllir 80 verið saman í 18 ár. Dávur er raskur enn og sæst nærum hvønn dag við hamara ella sag í hond, umbyggir, fríðkar og snøggar, viss ikki fyri seg sjálvan, so fyri onkran annan í familjuni.

Føðingardagurin verður hildin í Elim í Søldarfirði sunnudagin 17. september frá kl. 17.

**Vinfólk**

## Tøkk



Hjartaliga vil eg takka øllum tykkum, sum mintust til mín á mínum 80 ára degi.

Takk fyri blómur og gávur, heilsanir og uppringingar.

Og takk til tykkum í Vági, sum heiðraðu meg við at vinda Merkið á stong.

**Kærar heilsanir Mathilda í Líðini**

# Byrger Heinesen 75 ár



Í dag, mánadagin 11. september, verður Byrger Heinesen í Klaksvík 75 ár. Byrger var í mong ár skipari á Pride og seinni á Ternuni.

Foreldrini vóru bæði úr Kunoy, men Byrger er klaksvíkingur. Mamman var Byrghild fødd Dam, og pápin var Jákup Andrias Heinesen. Tey búðu niðri í Vági.

Mamman doyði nakrar fáar mánaðir eftir, at Byrger var føddur. Jákup Andrias giftist upp aftur í 1938 við Fridu fødd Nielsen og ættað úr Vatnsoyrum. Í seinnu giftu vóru fýra børn – Maria Marstein, Jacobina Hansen, Jórun Jensen og Pauli Heinesen. Tey búgva øll í Klaksvík.

Byrger fór ungur til skips. Hann sigldi eitt nú við skonnartunum Polo og Liljuni og við trolarum hjá Kjølbro. Á vári í 1952 leyk hann seturskiparaprógv á Klaksvíkar Sjómansskúla, og á vári í 1960 leyk hann longdina. Skúlagongdin var í Klaksvík, og próvtøkan í Havnini.

Pápi Byrger, Jákup Andrias, var í mong ár skipari á Britons Pride og seinni Pride. Skipini sigldu á farleiðini millum Klaksvík og Havnina og eisini á øðrum farleiðum. Kjølbro átti skipini og rak ruturnar, inntil tað almenna keypti Pride og yvirtók farleiðirnar. Byrger var stýrimaður og seinni skipari á Pride.

Tá ið tað almenna yvirtók farleiðina um Leirvíksfjørð, og Ternan varð keypt úr Týsklandi í november 1970, flutti Byrger á hesa farleiðina, har hann varð skipari mesta partin av sjeyti árunum.

Meðan ferjulegan varð gjørd í Leirvík, sigldu teir til Fuglafirðar, og síðani sigldu teir til Leirvíkar. Tað var um hetta mundið, at bilflutningurin um Leirvíksfjørð rættuliga tók dyk á seg.

Byrger var givin at sigla nakað frammanundan, at nýggja Ternan kom í 1980. Í 1976 hevði hann saman við soninum latið byggjað Esso støð á Biskupsstøð. Umframt bensinpumpu og sølubúð høvdu teir verkstað, sum sonurin hevði ábyrgdina av.

Byrger hevði støðina á Biskupsstøð inntil í 1992. Sonurin hevur seinni bygt bilverkstað í Klingrugarði. Har hevur Byrger bókhaldið, og hann gongur framvegis eins høgt upp í arbeiðið, sum hann altíð hevur gjørt.

Byrger giftist í 1954 Selmu fødd Samuelsen og ættað av Vágsheygnum. Foreldur hennara vóru Oluffa, sum var ættað av Viðareiði, og Sámal Samuelsen, nevndur Sámal í Leirvík. Selma og Byrger bygdu á Lítlubrekku. Tey eiga trý børn – John (1954), Oddrun Olsen (1959) og Borghild Johannesen (1964). Byrger eigur átta abbabørn og trý langabbabørn.

Byrger sang sum ungur í Betesda kórinum, og Selma var í kórinum í mong ár. Byrger var í fleiri ár limur í umboðsráðnum í Norðoya Sparikassa.

Føðingardagurin verður hildin í hugnaligа heiminum á Lítlubrekku frá klokkan 17 í dag.

**J**


